## Egil á Bø er givin



¯ Sum støðan er beint nú, so eri eg givin. Eg havi ivast rættiliga nógv, og havi eisini verið í samband við feløg. Men eg eri EB/Streymari og vil vera verandi EB/Streymari, men við trupulleikunum, sum hava verið, so havi eg tikið avgerð um at gevast fyri fyrst, sigur Egil á Bø.
Hann greiðir frá, at hann hevur verið í samband við onnur feløg, sum liggja langt uppi á stigatalvuni, og staðfestir, at har hevur verið klárt, men av tí, at hjartað liggur í EB/Streymi, vildi hann ikki taka av.
Hann staðfestir eisini, at spæliloyvið verður verandi í EB/Streymi.

# Smáu marginalirnir eiga stóran leiklut

**Onga staðni er kappróðurin so áskoðaravinarligur, sum hann er tað á Ólavsøku, tá ið tað er møguleiki hjá øllum manningum at bjarga róðrarárinum**

KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*




Í morgin verður punktum sett fyri hesum róðrarárinum. Soleiðis plagar tað at ljóða, og soleiðis siga vit tað aftur hesa ferð. Sannleikin í vendingini er kortini ikki so stórur nú, sum hann hevur verið áður. Nú er kappróður á skránni so at siga alt árið.

Inntil fyri ikki so nógvum árum síðani vórðu bátarnir flotaðir flaggdagin, og teir vórðu drignir í neystið fyri seinastu ferð eftir ólavsøkuróðurin. Nú er heilt øðrvísi. Tað verður vant og kappast á maskinum um heystið og veturin, og tað verður skipað fyri FM kapping í innandura rógving á vetri og vári.

Í fleiri feløgum verða bátarnir ikki flotaðir fyrrenn stutt undan Norðoyastevnuni. So at siga vísindaligu tilrættaløgdu venjingarætlanirnar verða umsettar til styrki, teknikk og kondi í rógvimaskinunum.

### Eygnavitnini

Nógvu áskoðararnir, sum savnast til ólavsøkuróðurin hugsa neyvan so nógv um, hvør íløgan hevur verið hjá manningunum, sum liggja klárar undir Argjahøvda og bíða eftir startskotinum.

Umstøðurnar at hyggja eftir kappróðri á Havnarvág framúr. Róðrarteinurin er styttri, enn hann er í hinum róðrarplássunum, men áskoðararnir eru fegnir um, at tað verður róð á hesum teininum og ikki t. d. uttanfyri Molan, har tað varð roynt fyrst í sjeyti árunum. Tá varð skjótt staðfest, at tann loysnin ikki var heppin, tí umstøðurnar vóru so ymiskar hjá bátunum.

Molin er vorðin longri, enn hann var, tá ið avgerðin varð tikin, um at tað skuldi rógvast á hesum teininum. Molin, Tinganes og vestara kai eru fín pláss at fylgja við frá, og á Argjahøvda er tað fasinerandi at vera eygnavitni, tá ið manningarnar liggja klárar at toga í árarnar fyri at fáa besta startspurtin og harvið at hava góðan møguleika at leggja seg fram í oddin og so at siga stýra kappróðrinum á stutta teininum.

Tá ið olympisku summarleikirnir í 1980 vóru í Moskva, var tað fyrsta ferðin, at sjónvarpið fylgdi væl við í kappsiglunum. Tá varð sagt, at kappsiglingin gjørdist almenn og fangandi fyri áskoðararnar. Soleiðis ber tað til at siga um kappróðurin í ár. Hann er vorðin nógv meiri viðkomandi og nærverandi, nú tað hevur borið til at fylgt við umvegis heimasíðuna hjá Kringvarpinum, og tað er at fegnast um, at enn eitt stig verður tikið í morgin, tá ið tað fer at bera til at fylgja við í sjónvarpinum.

### Kapprógvararnir

Øll tey, sum leggja sína orku í venjing og kappróður, hava brennandi ynski um at vinna á Ólavsøku. Eingin vil vinna FM uttan eisini at vinna á Ólavsøku. At verða meistari og samstundis at vinna á Ólavsøku kennist sum meistaraheiti við serligari sloyfu.

Hjá teimum, sum tað ikki hevur gingið soleiðis hjá í teimum seks undanfarnu FM róðrunum, sum tað varð vónað og roknað við, tá ið fyrstu tøkini vórðu tikin á Norðoyastevnu, er ólavsøkuróðurin eyka møguleiki. Nú ber til at seta glæsiligt punktum og harvið eisini kanska at kveikja undir hugin eisini næsta ár at seta seg við árarnar eftir strævnan vetur í rógvimaskinunum.

Tað er altíð trýst á kappróðrarfólkunum, tá ið tey bíða eftir startskotinum. Men trýstið er neyvan nakrantíð størri, enn tað er tað ólavsøkuaftan.

Tjaldrið við dreingjum og Argjabáturin hava vunnið allar róðrarnar og hava harvið tryggjað sær FM heitið. Gongurólvur við kvinnum er fýra stig frammanfyri næsta bátin, og tí skal vilja heilt illa til, um Havnar Róðrarfelag ikki fer at vinna FM í hesi kappingini.

Í hinum róðrunum er tað framvegis stórur FM spenningur: Jallurin hevur 38 og Firvaldur 37 stig í kappingini millum 5-mannafør við gentum, Frúgvin og Erla Kongsdóttir hava 39 stig í part í kappingini millum 5-mannafør við kvinnum, og Riddarin og Tvørabáturin hava 39 stig í part í kappingini millum 6-mannafør við monnum.

Klaksvíkingur hevur 40 stig, og Eysturoyingur hevur 38 stig. Um Eysturoyingur vinnur, og Klaksvíkingur ikki verður frammanfyri triðja plássið, so verður tað Eysturoyingur, sum fer at vinna FM og ikki Klaksvíkingur.

### Marginalirnir

Rógvararnir vita, at tað kunnu vera heilt smáir marginalir, sum gera av, um talan verður um sigur og fagna, ella um talan verður um tap og vónbrot. Hjá teimum, sum eru von at vinna, er alt annað enn fremsta plássið tap og vónbrot.

Tað eru fleiri lutir, sum hava alstóran týdning. Spurningurin er, um alt umborð riggar, sum tað skal. Halda homlubondini, tá ið rimmar fyrstu tøkini verða tikin, og halda árarnar, tá ið tað í allar fyrstu tøkunum stendur meiri á teimum, enn tað ger í restini av róðrinum.

Serliga á Ólavsøku, har teinurin er so stuttur, ræður tað um at fáa góðan start. Nú er róðrarárið so mikið nógv liðið, at stýrimenninir eiga at hava gott tak á at leggja kósina rætta. Men so er tað taktikkurin. Hvussu leingi skulu teir taka bekktøk, hvussu langur skal lunnaróðurin vera, og skulu eyka bekktøk takast, tá ið báturin nærkast ytra endanum á Molanum.

Ivaleyst er alt sovorðið avrátt frammanundan startskotinum. Men hetta verður vent og snarað fleiri ferðir, tá ið taktikkurin verður lagdur. Og ein annar spurningur er, um tað skal avráðast at skifta taktikk undir róðrinum, um tað vísir seg, at tað, sum frammanundan var avrátt, ikki hevur borið ta støðuna við sær, sum tað varð roknað við.

Grundvenjingin frá jólum og út á várið kennist ofta sum pína. Ólavsøkuaftan er møguleiki hjá øllum at fáa avkast burtur úr stóru og tíðarkrevjandi íløguni. Optimala avkastið er at koma fyrstur á mál á Ólavsøku og at verða meistari. Hjá øllum teimum, sum árið ikki hevur borið FM heitið við sær, ber tað til at bjarga íløguni við sigri á Ólavsøku.

Á startmálinum undir Argjahøvda er fokus á startinum, á detaljunum, á taktikkinum og á endamálinum undir Skipafelagnum. At hoyra áskoðarafjøldina koyra á sínar manningar tykist bera við sær, at áratøkini muna uppaftur meiri hjá summum. Hjá áskoðarunum kennist tað sum serligur leiklutur at bera sínar manningar fram.

Hóast vinnararnir eru fáir og taparanir nógvir, so livir vónin í øllum teimum, sum taka lut og teimum, sum halda við og taka á við einstøku manningunum. Tað er hetta, sum ger, at tað eisini í ár verður spennandi at fylgja við í kappróðrinum á Ólavsøku. Ólavsøkan er punktum fyri farna róðrarárið og samstundis startskotið til nýggja árið, og smáu marginalirnir kunnu hava stóran leiklut.

Góðan ólavsøkuróður!

**FM-kappróður**

| | 5-mannafør, dreingir | Stig íalt |
|---|---|---|
| 1 | Tjaldrið | 42 |
| 2 | Blikur | 32 |
| 3 | Teistin | 23 |
| 4 | Royndin Fríða | 20 |
| 5 | Junkarin | 20 |
| 7 | Báran | 17 |
| 8 | Kollur | 9 |
| 9 | Havfrúgvin | 3 |
| 10 | Sílið | 1 |
| 11 | Jallurin | 1 |
| | **6-mannafør, kvinnur** | |
| 1 | Gongurólvur | 40 |
| 2 | Páll Fangi | 36 |
| 3 | Sølmundur | 29 |
| 4 | Jarnbardur | 26 |
| 5 | Hvessingur | 18 |
| 6 | Romvlvs | 13 |
| | **5-mannafør, gentur** | |
| 1 | Jallurin | 38 |
| 2 | Firvaldur | 37 |
| 3 | Sílið | 27 |
| 4 | Hvassi | 20 |
| 5 | Havfrúgvin | 18 |
| 6 | Falkur | 12 |
| 7 | Báran | 7 |
| 8 | Junkarin | 4 |
| 9 | Kollur | 3 |
| 10 | Katla | 1 |
| | **5-mannafør, kvinnur** | |
| 1 | Frúgvin | 39 |
| 2 | Erla Kongsdóttir | 39 |
| 3 | Hvassi | 28 |
| 4 | Ritan | 26 |
| 5 | Blikur | 18 |
| 6 | Katla | 1 |
| | **6-mannafør, menn** | |
| 1 | Tvørabáturin | 39 |
| 2 | Riddarin | 39 |
| 3 | Sundabáturin | 24 |
| 4 | Smyril | 23 |
| 5 | Gongurólvur | 20 |
| 6 | Skúgvur | 12 |
| 7 | Rádni | 10 |
| 8 | Jarnbardur | 1 |
| | **8-mannafør** | |
| 1 | Argjabáturin | 42 |
| 2 | Árnfirðingur | 30 |
| 3 | Ørvur | 30 |
| 4 | Knørrur | 25 |
| 5 | Nevið Reyða | 3 |
| | **10-mannafør** | |
| 1 | Klaksvíkingur | 40 |
| 2 | Eysturoyingur | 38 |
| 3 | Ormurin Langi | 30 |